FYLGISKJAL 8

LM-050/2025

Til
Almanna- & mentamálaráðið
ammr@ammr.fo

Tórshavn 7. oktober 2025

**Hoyingssvar, uppskot til nýggja miðlastuðulslóg**

Føroysk Miðlafólk takka fyri møguleikan at koma við okkara viðmerkingum, nú landsstýrismaðurin hevur orðað uppskot til løgtingslóg um miðlastuðul.

Fyrst er at fegnast um, at játtanin til miðlastuðul økist úr 2,9 mió til 4,9 mió í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2026. Avgjørt eitt stig rætta vegin fyri at tryggja fíggjarliga grundarlagið undir privatum fjølmiðlum í Føroyum.

Lógaruppskotið leggur upp til ein nýggjan býtislykil, 60% rakstarstuðul og 40% íverksetarastuðul.

**Íverksetarastuðulin**
Tvær milliónir krónur skulu brúkast til at "seta ein nýggjan tíðindamiðil á stovn, sum miðlar sjálvstøðugt journalistiskt viðgjørt tilfar." Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið kann tilsøgn um íverksetarastuðul vera bindandi fimm fylgjandi fíggjarár. Og í serligu viðmerkingunum verður skotið upp, at ein tíðindamiðil fær allan íverksetarastuðulin.

Hetta tulka vit soleiðis, at politiska ynskið er at seta á stovn **ein** nýggjan, "privatan" fjølmiðil í Føroyum.

Føroysk Miðlafólk halda tað vera ruddiligast at halda eitt tílíkt politiskt ynski leyst av miðlastuðulslógini, og í staðin kjølfesta ein tílíkan, nýggjan fjølmiðil í egnari lóggávu. Tað kann til dømis gerast við Kringvarpinum sum fyrimynd (kringvarpslóg, public service skyldur osv.), tó at fíggjarliga raðfestingin til ein slíkan miðil sjálvandi má vera í samsvari við tey krøv, ið verða sett miðlinum.

Havandi í huga støðuna í miðlalandslagnum í dag kann spyrjast, um vit hava tørv á fleiri miðlum, heldur enn sterkari miðlum? Svarið liggur helst í tí upphædd, sum politiski myndugleikin er sinnaður at játta hesum nýggja fjølmiðli.

**Rakstrarstuðulin**
Um endamálið við rakstrarstuðlinum sigur lógaruppskotið, at "tryggja verandi tíðindamiðlum rakstrarstuðul í mun til beinleiðis journalistiska framleiðslu." Orðingin verður so nágreinað nakað í serligu viðmerkingunum.

Føroysk Miðlafólk taka undir við, at rakstrarstuðulin verður markaður beinleiðis og einans til journalistiska framleiðslu. Tað er vegurin fram, skal redaktionella umhvørvið á privatu miðlunum styrkjast.

Ein loysn kundi verið at gloppa dyrnar fyri, at tilsøgn um rakstrarstuðul í serligum føri kann játtast fyri fleiri ár í senn. Til dømis, um ein fjølmiðil kann vísa á eina ítøkiliga og væl undirbygda langtíðarætlan fyri, hvussu miðilin ítøkiliga ætlar at styrkja seg redaktionelt og bjóða eina betri, journalistiska framleiðslu. Við tilsøgnini um rakstrarjáttan fyri fleiri ár kann til dømis liggja treyt um at miðilin í árligari frágreiðing prógvar sítt virði og at langtíðarætlanin verður fylgd.

Sum yrkisfelag fyri miðlafólk í Føroyum vil Føroysk Miðlafólk gjarna vera ein konstruktivur viðleikari í øllum arbeiði, ið kann bøta um miðlalandslagið í okkara samfelag. Vit eru altíð til reiðar at svara spurningum og koma við okkara sjónarmiðum.

Vinarliga

**Føroysk Miðlafólk**